Landsfundurin skal vera ˙tpurring

Formaður Javnaðarfloksins ·sannar · landsfundinum, at flokkurin hevur ligið ov leingi Ì dvala og skal n˙ purrast ˙t. N˙ skulu gomlu javnaðarm·lini aftur setast Ì h·sÊti

LANDSFUNDUR
Edvard Joensen

Vestmanna:
Føroya framtíð verður avgjørd við næsta val. Og tí skyldar Javnaðarflokkurin fólki, at melda greitt út, hvat flokkurin vil, segði formaður Javnaðarfloksins í formansfrágreiðing síni á landsfundinum um vikuskiftið.

Landsfundur Javnaðarfloksins verður hildin í Skúlanum í Vestmanna undir herrópinum »Fólkið fyrst« . Og eingin ivi skal vera um, at Javnaðarflokkurin eigur at halda seg til síni upprunamál, sum eru almannamál og mál, sum koma vanliga borgaranum til góðar, segði Jóannes Eidesgaard.

Sum dømi um flokk, sum hevði gloymt hesi sosialdemokratisku aðalmál, nevndi hann norska Arbeiðaraflokkin, sum við valið fyrr í vikuni fekk ein rættiliga kjaftfisk. Júst tí, at hann hevði gloymt gomlu floksvirðini, segði Jóannes Eidesgaard.

Og frá verandi samgongu er einki at vænta hendanveg, segði formaður Javnaðarfloksins. Han vísti á, at landsstýrismaðurin við almannamálum beinleiðis hevði sagt, at einki røktarheimispláss er komið afturat í hesum valskeiðnum. Og hann ivaðist heldur ikki í, at tað kemur heldur einki haðani frá.

Javnaðarflokkurin hevur lagt uppskot fyri verandi løgting á hesum økinum. Men tey verða feld frá hond. Eisini mál, sum flokkurin hevur lagt fram saman við øðrum.

Allur politikkur í Føroyum er seinnu árini køvdur av fullveldismálinum, sum kortini ongan veg er komið.

– Har er stutt og greitt als einki komið burtur úr, segði Jóannes Eidesgaard.

Tað undraði hann, at støðan í dag er, at samgonguflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin nú knappliga er farnir at halla til Heimastýrislógina.

Hinvegin er Javnaðarflokkurin komin tað longri, at hann arbeiðir við eini sjálvsstýrislóg.

At landsstýrissamgongan ongan veg er komin við fullveldismálinum kemst av, segði Jóannes Eidesgaard, at samgongan torir ikki at fremja málið, sum teir so braneggjaðir settu sær eftir seinasta val.

Hví fullveldið doyði í føðingini, torir samgongan ikki at koma út og siga fólki.

Hóast roynt verður at billa fólki annað inn, er veruleikin, at samgongan hevur onga sum helst ávirkan á, hvussu long skiftistíðin verður. Hana fáa teir bara ásetta úr Danmark.

Hinvegin fer sjálvstýrislógin, Javnaðarflokkurin skýtur upp, at geva føroyingum avgerðarrættin yvir arbeiðsgongdini, segði Jóannes Eidesgaard, formaður Føroya javnaðarfloks, millum annað í ársfrágreiðin síni á landsfundinum í Vestmanna um vikuskiftið.

Farið varliga fram

Javnaðarflokurin eigur at minnast til, at t· hann leggur n˝ggja valskr· fram, eigur hann eisini at duga at greiða fÛki fr·, hvussu hon skal fÎggjast, segði ein fundarluttakari · landsfundinum

LANDSFUNDUR
Edvard Joensen

Vestmanna:
Fólk vóru samd um, at nýggja valskrá Javnaðarfloksins var eitt gott upplegg. Men mælt verður til at fara varliga fram og ansa eftir, at altíð er fíggjarligt grundarlag undir tí, sum skotið verður upp.

Thomas Arabo, sum var tann fyrsti, sum tók orðið eftir formansfrágreiðingina, mælti flokkinum til altíð at leggja upp fyri, soleiðis, at eitt uppskot frá flokkinum á tingi altíð legði meira upp fyri á útreislusíðuni, enn samgongan ger. Tí greitt er, at verandi samgonga hevur lagt alt, sum eitur almannamál aftur um fullveldismálið, sum fullkomuliga hevur køvt føroyskan politikk.

Eisini vísti hann á vandan við at lova ov mikið í eini valskrá. Hann vísti á mál sum undirsjóvartunnlar og ferjur, sum eingin er ímóti yvirhøvur. Men tað skal gjaldast, segði hann, og bað fólk ansa sær eitt sindur við at lova ov mikið.

Jákup Birgir Mohr vísti á, at Javnaðarflokkurin eigur ikki bara at lata fullveldismálið fara afturvið kortini. Tí flokkurin má ásanna, at hetta er mál, sum upptekur nógv ungfólk. Og teimum eigur flokkurin at siga frá, at sjálvsstyrislóg Javnaðarfloksins gevur Føroyum minst líka nógv fullveldi, sum fullveldismál tjóðveldisfloksins.

Munurin er bara tann, at Javnaðarflokkurin ikki krevur fullveldi her og nú, men fer skynsamari fram í neyvum samstarvi við Danmark.

Elin Lindenskov rósti eisini valskránni, men eftirlýsti eini neyvari frágreiðing um, hvussu røktarheimsparturin hjá kommunum skal fíggjast. Í skránni stendur bert, at landskassin skal bera sín part. Eisini eftirlýsti hon eini lýsing av, hvussu tey nýggju røktarheimini skulu síggja út. Stór ella smá? Hvønn tørv skulu fólk hava, sum sleppa inn? Dement? Menningartarnað? Sálarsjúk?

Jú, sanniliga er gott við slíkum politikki, og átroðkandi eisini. Men samstundis vísti hon á, at nýggju eldrasambýlini, sum nú verða bygd, eru gjørd eftir búligastu loysn, hóast tey eru frálík annars.

Ávísir manglar eru tó í skránni, vísti Elin Lindenskov á. Hon fegnaðist um, at flokkurin setir í valskránna, at børnini skulu fram um oljuna, sum nevnt verður í partinum um skúlan. Men flokkurin gloymir børnini undir skúlaaldur, segði hon. Men eisini tað er mál, sum arbeiðast skal víðari við, nú skjøtil er settur á.

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, ásannar, at tað kann verða ein trupulleiki hjá smáum kommunum at fara undir at byggja røktarheim. Men so er samstarv millum kommununar at týða til, metti hann.

Thomas Arabo

Hinvegin vísti hann á, at kommunurnar sjálvar eisini eiga part í trupulleikanu, tær kunnu fáa, tí tær hava bara tikið í móti teimum uppgávum, tær hava fingið álagdar frá samgonguni. Og eingin hevur mótmælt. Tað kann fara at koma afturum aftur hjá teimum, vísti Kristian Magnussen á.

Mangan verður víst til teir ovurlongu bíðilistarnar, sum eru á eldraøkinum.

Til tað segði Andrias Petersen, kommunulækni, at tørvurin er umleið 250 pláss.

Tað grundaði hann á kanningar, sum gjørdar eru av veruliga tørvinum heldur enn bara listunum, sum fólk sjálv skriva seg á, hóast tørvurin kann liggja nøkur ár frammi í tíðini. Fólk, sum vilja vera í góðari tíð og binda um heilan fingur.

Jákup Joensen vísti á, at parturin um fiskidagamarknaðin átti at lýsast betri.

Hann helt ikki, at fiskidagar nakrantíð eiga at verða søluvøra, men at tann, sum søkir um fiskiloyvi, skal fáa tað fyri einki frá tí almenna at brúka, meðan hann fiskar. Tá hann gevst, eiga dagarnir at falla aftur til landsstýrið, sum síðan kann lata tað til næsta umsøkjaran.

Jóannes Eidesgaard svaraði til tað, at tað í grundini var júst tað,sum lá aftan fyri hugsanina í valskránni. At fiskidagar ongantíð eiga at gerast spekulatiónvøra, soleiðis sum vit siggja tað í dag, og sum ein frí umsetiligheit altíð fer at gera teir til.

Umr·ðandi at f·a ungdÛmin við

Javnaðarflokkurin hugsar ov lÌtið um ungdÛmin, halda limir Ì Sosialistiskum Ungmannafelag

LANDSFUNDUR
Edvard Joensen

Hugsunarsamir luttakarar

Vestmanna:
Flokkurin brúkar ov nógva tíð upp á pensiónir og pensionistar, um ikki er tíð til at viðgera tørvin hjá ungsóminum eisini, helt umboð fyri SU, sum tók orðið á landsfundi Javnaðarfloksins.

Hann helt tó ikki, at tað er skeivt at brúka nógva orku upp á pensionistarnar. Sjalvandi ikki. Men tey ungu í dag kenna seg eitt sindur í villareiði, tá tosað verður um ungdómspolitikk hjá ymsu flokkunum, vísti hann á.

Ungfólk í dag vita ikki, hvar tey skulu halda seg politiskt, tí eingin flokkur er, sum veruliga dugir at siga teimum, hvat hann kann gera fyri tann partin av fólkinum. Alt gongur út upp á børn, tilkomin og eldri. Tað er líkasum at tann aldursbólkurin, sum liggur millum børn og tilkomin, bara verður burtur.

Javnaðarflokkurin eigur at fáa nógv betri tak á ungdóminum, vísa tey á í SU.

Men tað vóru ikki øll, sum vóru samd í, at Javnaðarflokkurin hevur mist tey ungu burtur ímillum.

Víst varð á, at tað er ikki so øgiliga langt síðan, at teir undirvísingarmøguleikar, sum eru í dag, vóru fyri øll. Fleiri teirra, sum vóru á fundinum, mintust, tá skúlaverkið bara var fyri tey fáu. Hevði eitt nú Javnaðarflokkurin ikki havt stríðst fyri einum skúla fyri øll, hevði verið enn minni av tilboðum til tey ungu, varð víst á.

”semja um eftirl¯nir

Floksformaðurin fekk bÊði undirt¯ku og mÛtst¯ðu, t· hann tÛk undir við, at landsst˝ris- og l¯gtingsmenn skuldu f·a eina gÛða eftirl¯n

LANDSFUNDUR
Edvard Joensen

Vestmanna:
Jóannes Eidesgaard fekk undirtøku frá einum landsfundaruttakara, tá hann metti, at tað var í lagi, at landsstýris- og løgtingsmenn fingu ta eftirløn, sum nú var samtykt.

Men restin av fundaruttakarunum, sum var á røðarapallinum eftir teir báðar, tók avgjørda støðu í móti slíkari talu. Eisingin ivi var heldur um, at landsfundurin sum heild helt, at tað var ikki javnaðarpolitikkur at játta sær sjálvum eina eftirløn, sum er margfald tann,um ein fólkapensionistur fær.

Jóannes Eidesgaard tók aftur í aftur, at tað var helst skeivt av Javnaðarflokkinum at taka undir við hesum uppskotinum uttan at seta sum treyt, at tað samstundis varð samtykt at seta samhaldsføstu eftirlønarskipanina í gildi.

Men hinvegin vísti hann á, at alternativið kundi verða, at flokkurin framprovokeraði fólkatrygginga hjá Fólkaflokkinum, og tað hevði verið ein rein vanlukka, vísti hann á.

Eitt sindur av hyklarí metti hann kortini lá aftan fyri tað, fundurin førdi fram. Tí fáa politikarar onga eftirløn, er vandi fyri, at eingin fer upp í politikk, tí tað loysir seg betri at tjena sær eftirløn aðrastaðni. Og á tann hátt kunnu nógvar góðar kreftir fara fyri einki, segði Jóannes Eidesgaard.

Semja var ikki um eftirløn

Mynd: Jens K. Vang

Starvsnevndin afturvald

Landsfundurin valdi einmÊlt starvsnevndina aftur

LANDSFUNDUR
Edvard Joensen

Vestmanna:
Starvsnevndin í Javnaðarflokkinum stillaði uppaftur og varð øll einmælt afturvald.

Tað vóru eingi mótvalevni til starvsnevndina hjá Javnaðarflokkinum, tá nevndin skuldi veljast á landsfundinum.

Jóannes Eidesgaard varð afturvaldur sum formaður, meðan Jancy Olsen og Bergur P. Dam halda fram sum næstformenn.

Flokksskrivari er enn, sum undan landsfundinum, Eyðólvur Dimon, meðan Viljehelm Johannesen, Katrin Dahl Jacobsen og Ragnhild Olsen halda fram sum starvsnevndarlimir.

Jancy Olsen varð afturvald til næstformann í Javnaðarflokkinum saman við Bergi Dam

VIÐMERKINGAR

¡ heitan · Landsst˝rismannin Ì mentam·lum

Í seinnu greinini av tveimum hjá Finnuri Helmsdal um økismenning nevnir hann flytingina av Stuðulsstovninum til Runavíkar. Undirritaðu, sum starvast á Altjóða Skrivstovuni og á LFÚ-Ráðgevingini, hava hesar viðmerkingar:

Tørvurin á vegleiðing um útbúgvingar er vaksandi. Í dag eru fólk í øllum aldri undir útbúgving, útbúgvingartilboðini verða fleiri og fleiri, og útbúgvingarnar kunnu takast um allan heimin. Í skúlunum veita skúlaráðgevar og lestrarvegleiðarar generella vegleiðing um útbúgvingar. Tá ið tey ungu skulu søkja inn á ein útbúgvingarstovn eru trý støð, har tað ber til at fáa kunning um umsóknarbløð, upptøkutreytir, bústað, stuðulsmøguleikar og mangt annað. Tey trý støðini eru LFÚ-ráðgevingin, Altjóða Skrivstovan og ikki minst Stuðulsstovnurin. Skrivstovurnar hjá øllum trimum eru í Tórshavn — ikki í sama húsi, men kortini í sama býi.

Vit sum arbeiða á einum av hesum støðunum kunnu ikki ímynda okkum, at vit skulu flyta enn longur burtur frá hvør øðrum, heldur áttu vit at verið løgd undir sama tak — ella møguliga at verið løgd saman. Var alt á einum staði, sum Finnur Helmsdal nevnir eitt kraftsentur, kundu enn fleiri, sum ætlað sær undir útbúgving, komi at fingið holla og fjølbroytta ráðgeving á sama staðið. Tað er trupult á ímynda sær, at tey sum ætla sær undir útbúgving ikki skulu vitja á minst tveimum av støðunum og annað verður altíð Stuðulsstovnurin.

Í hinum Norðanlondunum eru útbúgvingar- og lestarvegleiðarar altíð í teimum størru býunum, tvs teimum býunum har flestu skúlarnir og tey flestu eru, sum ætlað sær undir útbúgving. Okkum kunnugt er eingin útbúgving fyri ung eftir 10. flokk í Runavík.

At flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar, við vandanum um at missa starvsfólkini og ikki minst royndir teirra, er sum at flyta bilasøluna hjá Meinhardi Arge til Nólsoyar!

Hevði tað ikki verið eitt skilagott hugskot at tikið starvsfólkini á teimum trimum stovnunum við uppá ráð, at vita hvat tey siga?

Vit vóna at avvarðandi myndugleikar lesa hetta og ein virðlig loysn fæst á hesum málinum.

Fyri LFÚ-rágevingina:
Inger Fløe Jørgensen og Bjørg Róin

Fyri Altjóða Skrivstovuna: Holger Arnbjerg

Tórshavn 17.9. 2001

Um at privatisera

Palli Dalsgaard

Nú spøkir ætlanin aftur hjá landsstýrinum um at privatisera. Og sum ikki einaferð eru tað bussarnir, ið standa fyri skoti, partvís at verða privatiseraðir og partvís rutur, ið geva ov lítið, skulu niðurleggjast.

Hvat, ið verður gjørt aðrastaðni í Føroyum, viðkomur ikki okkum, sum búgva í Sandoynni. Eitt er heilt vist, verður núverandi bussruta her hjá okkum niðurløgd, tað verður ein so stórur saknur, at tað verður ein skandala. Og tað verður tað sama, um hon verður skerd, minkað. Vit eru øll greið yvir, at tað ferðast ikki nógv fólk við bussinum, og at tað tíverri sita fólk innan fyri gardinurnar og læa so hjartaliga at bussunum, ið koyra tómir. Men hesi fólk hugsa ikki um, hvør nytta er í bussunum hjá teimum fólkum, sum hava brúk fyri teimum. Havi latið mær sagt, at síðan Teistin kom at sigla er flutningurin av bilum vaksin munandi og ferðafólkatalið í bussunum minkað tilsvarandi. Tað er væl skiljandi, men av teirri orsøki er ikki rætt at niðurleggja bussrutuna. Tað verður so dúgliga bæði tosað og skrivað um bygdamenning av øllum politiskum flokkum. Størsta bygdamenning, ið nakrantíð er farin fram í Føroyum, er Strandferðslan, og næst henni eru Bygdaleiðir. At hugsa sær til, at onnur henda menning skal hvørva, tí hon ikki ber seg, tá er ilt at skilja hvør meiningin er við bygdamenning. Heilt einki av ferðafólki er ikki í Sandoynni, tí tað kemur meira enn so fyri, at tríggir bussar eru á Skopunarkei at taka ímóti fólki, tí brúk er fyri teimum. Skúlabarnatalið í Meginskúlanum er í vøkstri, og allur tann aktivitetur har er eftir skúlatíð krevur nógvan og góðan flutning. Tað sigur seg sjálvt, at fara at minka um bussrutuna her hjá okkum, tað er óðamannaverk. Vit hava krav uppá, at okkara løgtingsmenn lata hoyra frá sær og ikki lata eitt so stórt og álvarsamt mál fara fram óátalað av teimum.